# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Hjartaliga takk

til øll, ið luttøku í jarðarferðini hjá

**Wivicu Birch Larsen**

Hjartaliga takk fyri blómur og kransar.

*Kærar heilsanir*
**Gunnar**
**Gurið, Birita Lilja**
**Maria, Rasmus og Eliza**

## Tøkk

Vit takka so hjartaliga fyri sýnda umsorgan og heiður, tá góði maður mín, okkara kæri pápi, beiggi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Axel Mortensen**
Akka

doyði og varð jarðaður.

*Vegna tey avvarðandi*
**Mia**

## Merkisdagar

**Føðingardagur**
Í morgin, týsdagin 5. januar, fyllir Sylvia Sivertsen í Klaksvík 80 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá dóttrini í Geilini 22 frá klokkan 16.00.

**Gullbrúdleyp**
9. januar 2010 hava hjúnini Arndis og Eli Davidsen, Møllemarksvej 28, 4291 Ruds Vedby, gullbrúðleyp
Dagurin verður hildin saman við næstringum, vinum og kenningum í Reerslev Forsamlings-húsi frá kl. 15.00.

**Gullbrúdleyp**
12. jan. hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagurin**
4. januar. Metusalem, sonur Enoks. Hann gjørdist 969 ár (1. Mós, 5, 25-27).
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

Jógvan Arge:

# Fjøruti ár í Útvarpinum




Jógvan Arge útvarpsmaður kundi fríggjadagin 1. januar halda sín 40 ára starvsdag í útvarpinum hjá Kringvarpinum.

Jógvan er 62 ára gamal, føddur og uppvaksin í Havn, sonur Petru, f. Gregersen, og Niels Juel Arge. Hann er næstelstur av fimm systkjum. Hini eru: Jórun, Ólavur, Suffía og Magni

Barna- og unglingaárini búði hann á Tinghúsvegnum, gekk í nonnuskúla, millumskúla og studentaskúla. Eftir lokið studentsprógv í Hoydølum í 1966, fekk hann sær útbúgving sum journalistur á Ritzaus Bureau í Keypmannahavn frá 1967-70 og byrjaði sum programmedarbeiðari í Útvarpi Føroya 1. januar 1970. Frá 1979-1989 var hann leiðari fyri tíðindadeildina, og eftir tað var hann programleiðari á stovninum til 2008.

Jógvan var formaður í Ítróttasambandi Føroya frá 1978-1980, og í 1999 fekk hann heiðursviðurkenning frá ÍSF. Síðan 1. januar 2001 hevur hann verið limur í Tórshavnar Býráð fyri Tjóðveldisflokkin. Hann hevur eisini verið varaborgarstjóri.

Jógvan er helst best kendur fyri at duga væl at útvarpa kappróður og fótbóltsdystir, umframt at hann eisini er kendur sum rithøvundur. Hann hevur m.a. skrivað ymisk minnisrit og bøkur um føroyingar í Grønlandi.

Hóast Jógvan varð sagdur úr starvi í Kringvarpinum 16. desember í 2008, so kann hann kortini halda sín 40 ára starvsdag, tí hann hevur kortini øll hesi 40 árini verið í starvi hjá fyrst Útvarpi Føroya og síðani Kringvarpi Føroya. Í summar gjørdi Mentamálaráðið av at ógilda uppsøgnina av honum, og tí varð hann í oktober aftur settur í starvið, sum hann sostatt ongantíð var farin úr – men eftir egnum ynski í niðursetta tíð.

Jógvan er giftur við Maritu f. Niclasen úr Nesi í Hvalba. Børnini eru: Niels Juel, Uni og Jóhanna.

Ert tú góður við tíni húsdjór?
So er SKYTTENS hunda- og kettufóður rætta valið






**SPECIAL** (20 kg)
Turrfóður til vaksnar hundar við vanligum tørvi. Serlig oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum gevur ein blankan og skínandi pels og syrgir fyri at pelsurin ikki gerst turrur. Er tískil eisini sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SPECIAL er eisini sera gott fóður til eldri hundar.
**Fyri posan...... kr. 450,-**




**SØCLA** (20 kg)
Turrfóður til hvølpar, unghundar og tíkir, ið geva mjólk. Inniheldur serliga oljublanding við týdningarmiklu omega-3 og omega-6 feittsýrunum, ið gev ein blankan og skínandi pels. Er tískil sera gott til hundar við húð- og pelstrupulleikum. SØCLA er eisini gott til aktivar hundar. SØCLA inniheldur C-vitamin.
**Fyri posan...... kr. 540,-**



**SKYTTENs KAT** (15 kg)
Turrfóður til kettur við nógvum proteinum frá fiski, flogfenaði og eggum. Inniheldur úrdráttir úr høsnarungalivur, ið m.a. stimbrar smakkin. Lága PH-virðið fyribyrgir urinsteini (struvitkrystallum). Inniheldur TAURIN, ið er ein aminosýra, ið hevur týdning fyri nethinnuna, hjartamuskulaturin og immunverjuna.
**Fyri posan...... kr. 390,-**

SKYTTENS hunda- og kettufóður er hágóðskufóður, ið hevur verið framleitt í Danmark síðan 1970. Fóðurið verður útflutt til nógv lond og fæst nú eisini í Føroyum. Fullfóðrið er framleitt úr fiski og høsnarunga og inniheldur ikki konserveringsevni, litevni, aromaevni ella sojaprotein.

**Bíleggjast kann við at senda t-post til kho@olivant.fo ella við at ringja á tel. 22 12 40. Ókeypis útkoyring í Tórshavn**